## Sekkjaður fyri drekkarí

Norski Thomas Myhre, sum eitt skifti vardi málið hjá danska FCK, hevur nú fingið sekkin frá norska felagi sinum, Viking. Orsøkin til hetta skal finnast á venjingarleguni, sum Viking var á á Marbella í Spania. Her fingu spælararnir loyvi at fara í býin, og tað gjørdi Myhre somikið væl, at hann ikki var komin upp, tá taktik-fundur skuldi haldast næsta morgun, og hann megnaði heldur ikki at taka lut í venjingini.



## Søguligur sigur til Kina

Síðani Kina og Suðurkorea spældu fyrsta fótbóltslandsdystin sínamillum í 1978, hevur tað ongan tíð eydnast kinverjum at vinna hesa uppgerðina. Men tað broyttist í gjárkvøldið. Í fýralandakapping, sum verður spæld í Tokyo, vann Kina nevnliga tryggan 3-0 sigur á Suðurkorea. Suðurkorea er annars eitt av liðunum, sum í summar skal taka lut í HM-endaspælinum í Suðurafrika.

### SÍ-Fleyr 3-1 (28-26, 25-14, 24-26, 25-20):

# Tvey sett koppaðu

**Í tveimum av teimum fýra settunum í mansdystinum í Sørvági í gjárkvøldið var sera javnt, og tey kundu farið báðar vegir. Tey fóru hvør sín veg, men í hinum báðum settunum var SÍ klárt betri og vann dystin**




Hilmar Jan Hansen



Hóast Fleyr royndi sítt besta í Sørvági í gjárkvøldið, eydnaðist ikki at vinna á SÍ, sum sostatt saman við Mjølnir skal spæla FM-finalurnar í Eik-liguni hjá monnum

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað grettir ikki, at tá Fleyr spælir ímóti teimum báðum ovaru liðunum, Mjølnir og SÍ, so er talan um spennandi og javnar dystir, har Fleyr í øllum førum fær eitt ella tvey sett – eina eina ferð trý. Dysturin í Sørvági í gjárkvøldið var sum so einki undantak, tó hóast Fleyr ongantíð kom í snúningar í tveimum av settunum, var sera javnt í hinum báðum.

At hetta var seinasta útkall hjá Fleyr, sást í fyrsta setti, har liðið stríddist fyri sakini og eisini fyri tað nógva var eitt lítið sindur frammanfyri. Liðini fylgdust fyrstu løtuna, men við Fleyr sum tí, ið hevði hug at fara framum. Eftir javnleik 13-13, var Fleyr á odda við einum og tveimum bóltum, líka til SÍ aftur javnaði til 19-19.

Eftir hetta gjørdist tað eitt satt nervakríggj um, hvat av liðunum skuldi fara avstað við sigrinum. SÍ, sum hevði ligið eitt lítið sindur undir, vísti seg at hava sálarligu yvirvágina, men máttu stríða seg ígjøgnum tríggjar settbóltar, áðrenn tað eydnaðist at taka settið.

### Fleyr kom aftur

Hetta hevði óivað kravt nógva orku hjá gestunum, tí í øðrum setti gjørdist tað avsmurningur, tí nú var SÍ nógv betra liðið. Serliga gjørdi Emil Mikkelsen um seg í álopinum og við sínum kraftfulla stíli syrgdi fyri heilt nógvum av stigunum, sum SÍ vann sær.

Fleyr vildi tó ikki geva upp, hóast støðan nú var 2-0 til SÍ. Tí líktist triðja sett nógv fyrsta setti, har tað ongantíð ordiliga gjørdist leyst millum liðini. Fyri tað nógva hevði Fleyr munin, og hóast tað ikki eydnaðist at vinna fyrsta settbóltin, so tað í staðin gjørdist javnt, 24-24, megnaði Fleyr at halda høvdið kalt og taka næsta møguleikan og settið.

Tað var framvegis púra opið langt inn í fjórða sett, og liðini fylgdust upp til 15-15. Men so setti Ragnar í Haraldsstovu seg sjálvan inn, og beinanvegin eydnaðist honum at blokka nakrar ferðir, so SÍ kom framum, og síðani gekk bara ein veg við settinum, ið sørvingar endaðu við at vinna rímiliga trygt, so tað gjørdist ein 3-1 sigur.

# Mjølnir og SÍ í finaluni

**Eftir at SÍ í gjárkvøldið vann á Fleyr, er greitt, at SÍ saman við Mjølnir kemur í FM-finalurnar hjá monnum, meðan Fleyr má taka til takkar við bronsuni**




Hilmar Jan Hansen

Tendensurin hevur verið tann vegin í allan vetur, men í gjárkvøldið gjørdist tað endaliga greitt, at tað verða Mjølnir og SÍ, sum skulu spæla FM-finalurnar í Eik-liguni hjá monnum. Hetta, tí SÍ í gjárkvøldið vann á Fleyr, sum tí hevur mist møguleikan at fáa annað av teimum báðum fremru liðunum aftur.

Framvegis skulu írestandi dystirnir sjálvandi spælast, tí tað er ikki líkamikið, hvat av teimum báðum finaluklároliðunum endar fremst í landskappingini. Spælast skulu fyrst tvær FM-finalur á uttanveltaðum vølli, men verður neyðugt við einari triðju finalu, fær tað liðið heimavøll, sum endaði sum nummar eitt í sjálvari landskappingini.

Tað vil siga, at enn stendur púra opið, um tað verður SÍ ella Mjølnir, tí liðini hava ávikavist tríggjar og fýra dystir eftir at spæla – harav ein er teirra millum. Hinvegin kundi Fleyr fyri tað longu fingið bronsuna handaða, tí tað plássið broytist ikki. Fleyr kann ikki fáa liðini frammanfyri aftur, samstundis sum ÍF á botnplássinum heldur ikki kann fáa Fleyr aftur.

Í allan vetur hevur Fleyr verið tað minst støðuga av teimum trimum fremstu, umframt at eydnan heldur ikki hevur verið við, tá talan hevur verið um heilt javnar dystir. Fleyr hevur fimm ferðir spælt fimmsettarar ímóti Mjølnir og SÍ, og bara ta einu ferðina hevur Fleyr vunnið.

At klaksvíkingar og sørvingar hava verið teir stinnastu í vetur, verður eisini undirstrikað av, at júst hesi bæði liðini eisini hittast í steypafinaluni hjá monnum, sum verður um eina góða viku. So fáa vit at síggja, um annað liðið fer avstað við greipuni ella um tey koma at býta steypið og føroyameistaraheitið ímillum sín.